Ráðstevna um altjóða fjølbroytni:

# Fjølbroytni er framtíðin

**Boðskapurin var greiður: Ein fyritøka, ið ikki megnar at virðismeta aðar hugsunarhættir enn sínar egnu, steðgar upp. Innanhýsis drívmegin stirðnar, og fyritøkan missir marknaðarøki. Soleiðis ljóðaði niðurstøðan á Ráðstevnuni um altjóða fjølbroytni, ið var hildin á Hotel Føroyum fríggjadagin**

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Armida russel, rithøvundur og verætlanarleiðari, leiddi Ráðstevnuna um altjóða fjølbroytni*

Eini 30 stjórar og starvsfólk úr ymiskum føroyskum fyritøkum vóru savnað á Ráðstevnuni um altjóða fjølbroytni, sum norska skeiðsfyritøkan FloodRocks skipaði fyri.

Á stevnuni legði amerikanski rithøvundurin og verkætlanarleiðarin Armida Russel fyri fyrstu ferð síni úrslit fram í einum europeiskum landi. Hetta vóru úrslit av eini verkætlan, ið hevur kannað, hvønn týdning altjóða fjølbroytni hevur í vinnuhøpi.

### Myndin úteftir

»Uttan fjølbroytni, ongin nýskapan og uttan nýskapan, ongin menning.« Hetta vóru nøkur av slagorðunum, tá Armida Russel greiddi frá, hvussu hugburðurin til hugtakið »fjølbroytni« hevur broytt seg seinastu 20 árini. Heilt fram til 1980 ini vóru flestu starvsfólkini á amerikonskum fyritøkum hvít mannfólk úr miðalstættini, og ongin broyting hendi, fyrr enn javnstøðulógir og forrættindareglur vórðu settar í gildi, sum tryggjaðu øllum somu rættindi til arbeiði. Veruligar broytingar hendu tó ikki, fyrr enn stórar fyritøkur sum IBM varnaðust, at at tær mistu stór marknaðarøki uttan at hava broytt marknaðarpolitikk. Og júst hetta vísti seg at vera trupulleikin. Meðan marknaðurin gjørdist alsamt meir fjølbroyttur, tvíhelt fyritøkan um sín siðbundna vinnupolitikk.

Ein niðurstøða var, at jú meir einsháttað ein fyritøka er, jú fleiri samfelagsbólkar útihýsir hon, tí møgulig viðskiftafólk ikki kenna seg sjálvi aftur í myndini, fyritøkan vísir úteftir. Vil ein fyritøka náa ein fjølbroyttan marknað, má hon »prógva« tað við ikki at gera innanhýsis mismun vegna kyn, aldur, rasu, seksuella orientering, trúgv ella annað, hvørki í leiðsluni ella í starvsfólkahópinum.

### Sjálvrannsakan

Armida Russel hevði skipað sína kanning undir yvirskriftunum Høvd, Hjarta og Hendur fyri at lýsa, hvussu vit fyrst mugu skilja ymiskleikar hvør hjá øðrum fyri síðani at rúma teimum, áðrenn vit kunnu fremja nýggja hugburðin í verki. Stevnuluttakarnir skuldu tí hvør sær svarað eini røð av nærgangandi og sjálvrannsakandi spurningum. Á spurnarbløðunum kundi tú vera meir ella minni samdur við útsøgnum, sum til dømis: »Eg velji helst at vera saman við fólkum, ið eru sum eg« ella »Eg royni aktivt at læra um munir í siðum, trúgv og royndum hjá øðrum«. Luttakarnir sluppu at halda síni svar fyri seg sjálvan, men samanteljiningin gav eina meting av tínum hugburði mótvegis menniskjum, sum eru øðrvísi enn tú sjálv. Luttakarnir brúktu nógva tíð uppá at svara hesum spurnarbløðum, sum tóktist at geva teimum flestu rættiliga nógv høvuðbrýggj.

### Føroyskt vinnulív ov einsháttað?

Ætlanin við ráðstevnuni var ikki at fella dómar yvir føroyskt vinnulív. Men tað lá í luftini, at okkara vinnulív hevur nógv eftir at læra, tá tað ræður um at draga nýggjar og øðrvísi førleikar til sín og at troyta nýggjar marknaðir. Ella sum ein av luttakarnum segði: »Eg kundi hugsað mær at vita, hví vit á okkara fyritøku altíð seta fólk í starv, sum líkjast mest okkum sjálvum. Úrslitið er, at øll í fyritøkuni duga stórt sæð tað sama.«

Kjakið um føroyskan útlendingapolitikk spøkti eisini millum luttakarnar. Fólk vóru neyvan samd um spurningin, men sambært kanningini hjá Armida Russel eru ábendingar um, at føroyskt vinnulív ikki bert í ferð við at stongja seg burtur frá umheiminum, men eisini frá innanhýsis nýhugsan og menning.

Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways, helt fyrilesturin hjá Armidu Russel vera sera áhugaverdan og kompetentan.

– Hóast ráðstevnan var í so nógv merkt av amerikanskum spurningum og viðurskiftum, ber væl til at flyta evnið yvir á føroysk viðurskifti. Vit hava avgjørt nógv eftir at læra, tá tað ræður um hýsa øðrum hugsunarhættum, heldur Magni Arge.



*Eini 30 stjórar og starvsfólk vóru á ráðstevnuni á Hotel Føroyum fríggjadagin*

# Tað ókenda ikki ein hóttan

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Reglurnar í arbeiðslívinum eru í ferð við at broytast. Vit verða ikki longur mett eftir útbúgving ella fakligu førleikum, men eftir okkara atburði og hvussu vit eru móvegis øðrum. Uttan mun til, hvørjum tú arbeiðir við, verða tað hesir eginleikar, sum í framtíðini gera av, hvørjum úrslitum, tú røkkur.«

Hetta er útgangstøðið hjá norsku skeiðsfyritøkuni FloodRocks, ið stendur aftanfyri Ráðstevnuna um altjóða fjølbroytni. Føroyingurin Kaj Magnus Klein starvast sum kundaráðgevi í FloodRocks, og tað er hann, ið hevur fingið ráðstevnuna til Føroyar.



*Kaj Magnus Klein, kundaráðgevi og samskipari hjá skeiðsfyritøkuni FloodRocks*

– Øll okkara skeiðir snúgva seg um nýskapan innan arbeiðs- og vinnulívið. Vit hava fyrr skipað fyri skeiðum á føroyskum fyritøkum, millum annað á Vatnsoyra Snikkaravirki, SEV og Atlantic Airways, men hesuferð samdust vit um at gera skeiðið alment, tí tað fevnir so breitt.

– Eg haldi, at føroyingar hava lyndi til at fata alt tað, sum er fremmant, sum eina hóttan heldur enn íblastur. Vit kunnu bara lurta eftir útlendingkjakinum í løtuni, tí tað sigur ikki so lítið um hugburðin. Hetta er sjálvandi ikki serstakt fyri føroyingar, men eg ivist í, um vit hava givið okkum far um, hvussu álvarsligar avleiðingar hesin hugsunarhátturin kann fáa fyri alt okkara vinnulív.

Kaj Magnus minnir á, at fyrsta treytin fyri at menna okkara høvuðsvinnu er gott samstarv við onnur lond.

– Tað er ikki nokk bara at gera onkrar hissini søluavtalur, tí tað kunnu øll onnur eisini. Vit mugu leggja okkum nógv meir eftir at skilja aðrar mentanir og livihættir, fyri at vera opin fyri og laga okkum eftir eftirspurninginum í øðrum londum.

– Við oljuvinnuni fáa vit eisini meir enn nakrantíð brúk fyri serkunnleika útifrá. Vit mugu vera til reiðar at taka ímóti hesum fólkum og seta okkum inn í teirra arbeiðs- og hugsunarhættir. Vit skulu ikki vera so bangin fyri, at onnur koma og taka okkum av ræði. Heldur skulu vit virðismeta, at onnur duga okkurt betri enn vit, og so læra av tí – og øvut, sigur Kaj Magnus Klein.



# Nýggj krøv til leiðslur

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Kristina Thomsen frá marknaðardeildini hjá Postverk Føroya var ein av luttakarnum á ráðstevnuni.



*Ein av stevnuluttakarnum, Kristina Thomsen, sum starvast á marknaðardeildini hjá Postverk Føroya*

Kristina heldur, at føroyskar fyritøkur gera alt ov lítið fyri at útnytta áhugamálini og førleikarnar hjá teimum einstøku starvsfólkunum og fyri at fáa tey at arbeiða saman í verkætlanum.

– Í staðin sita vit við hvør sínum avmarkaða uppgávuøki og loysa uppgávurnar sum frægast. Postverk Føroya er til dømis ein rættiliga gomul fyritøka. Her hava vit innarbeitt nakrar siðvenjur, sum ikki eru so lættar at broyta. Hvørki hjá starvsfólkunum ella hjá leiðsluni. Sjálvt um uppgávurnar innan tey ymsu starvsøkini broytast, verður sama fólkið oftast sitandi við uppgávunum. Tað er als ikki víst, at hesi fólkini tíma serliga væl ávísar uppgávur, innan teirra øki. Men tað vita vit ikki tí, tey verða ikki eftirspurd.

Kristina heldur tað vera løgi, at vit hugsa so lítið um, hvønn týdning tað hevur, at fólk tíma tað tey arbeiða við.

– Eitt er, at fólk høvdu trivist nógv betri á arbeiðsplássinum. Men í síðsta enda hevði úrtøkan verið nógv størri, tí fólk høvdu lagt størri arbeiði í uppgávuna.

– Men hetta krevur nýhugsan og fyrst av øllum, at leiðslurnar lata eyguni upp fyri, hvussu ymisk starvsfólkini eru menniskjaliga. Í staðin fyri allatíðina at tvíhalda um, at hvør eigur sítt starvsøki, átti vit í størri mun arbeitt við verkætlanum, har okkara ymisku persónligu eginleikar veruliga komu til sín rætt – og ikki minst góvu hinum í bólkinum nýggjan íblástur, sigur Kristina Thomsen.



*Sjálvrannsakandi uppgávurnar um fordómar góvu luttakarnum rættiligt høvuðbrýggj*

# Vandamikil ráð um krabbamein á alnetinum

**Sjúklingafelagið, Kræftens Bekæmpelse, er farið í herna móti skeivum upplýsingum um alternativa viðgerð. Eisini bretskir granskarar rópa varskó og mæla serliga krabbameinsfeløgum til at vera virkin í stríðnum móti skeivum tilráðingum**

ALTERNATIV VIÐGERÐ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Danska felagið hjá krabbameinssjúklingum vil upplýsa um alternativar viðgerðir og læra fólk at vera meira vandin. Orsøkin er, at alnetið er vorðið eitt »eldorado« av ivasomum viðgerðum móti álvarsligum sjúkm.

Alt fleiri tilráðingar av meira ella minni ivasamum viðgerðarhættum móti sjúkum eru nú at finna á alnetinum. Skeivar upplýsingar um álvarsligar sjúkur, sum krabbamein, trívast væl har og verða sendar út við eitt nú telduposti.

Fyri at koma skeivu upplýsingunum til lívs, er danska krabbameinsfelagið farið í herferð. Eisini ynskja tey at læra brúkaran at verða meira vandin, tá hann leitar á alternativa marknaðinum.

Á heimasíðuni, www.cancer.dk, boðar felagið frá eini evnisrøð, sum byrjar í Odense seinast í mánaðinum við evninum, »Den kritiske forbruger af alternativ behandling«.

Bretska tíðarritið, Annals of Oncology, skrivar, at ein bólkur av granskararum mæla stórum sjúklingafeløgum, serstakliga á krabbameinsøkinum, at fara virkin inn í stríðið móti skeivum tilráðingum um alternativa sjúkuviðgerð.

Granskararnir hava kannað 32 av teimum best umtóktu heimasíðunum á enskum tungumáli, sum bjóða alternativa ráðgeving til krabbameinsrakt.
Hóast flestu ráðini vóru óskaðilig, funnu teir eisini heimasíður, sum mugu sigast at vera beinleiðis vandamiklar, við tað, at tær fráráða sjúklingum at fara í vanliga góðkenda læknaviðgerð.

Krabbameinssjúklingar eru løtt offur, tí roynir Kræftens Bekæmpelse, umframt at halda eina røð av evnisfundum, eisini at útbyggja heimasíðuna, so sjúklingarnir har kunnu finna tilfar um alternativar viðgerðir.

*Kelda: Politikken.*



*Alnetið íður við við skeivum upplýsingum um alternativa sjúkuviðgerð. Hesum er Kræftens Bekæmpelse nú farið í herna móti*